Hvat er íslendska orðið naumur?

Eftir Chr. Matras.

Hjá Föroyingi, sum er kunnigur við íslendska orðið *naumur* og orð, sum tí eru skyld, dettur tað beinan vegin í huga, at her man *m* vera komið av sama frumljóði sum *v* í föroyskum *neyvur*, *neyvan* o. s. fr. Verður gjöllari eftirkannað, tykir mær, at fullvissa fæst fyri, at so er. Men so hevur ikki verið hildið higar til dags. Vit fara tí her at gera grein fyri tí, sum menn hava skrivað um upprunan hjá orðinum *naumur*, men áðrenn vit nærkast sjálvum evninum, verður her gjört vart við onnur orð, har *m* er komið av fornnorrönum *f*.

Úr föroyskum er eittans dömi at nevna: hjáorðið (og fyrisetingin) *oman*. Tað er sum kunnigt sama orðið sum íslendskt *ofan*, norskt og svenskt *ovan*, danskt *oven*. M. Hægstad sigur í »Færöymaal« (Vestnorske Maalf. II. 2 [1917] bls. 118), at í Telemark eru til orðsniðini *åman*, *åmanå åmanfyri*, o. fl., og leggur aftrat: »Yvergangen kann vel ha byrja i *ofanfyri*, *ofanfrá* (dissimilation)«. Aðrir hava kanska hug at halda, at her hevur nasaljóðið *n* í *ofan* drigið »*f*« (t.e. tvívarrað trongaljóð) yvir í nasaleiðina, so at úrslitið verður *m* og ikki hitt vanliga *v*-ið í föroyskum (og norskum). — Nýíslendskt mál hevur altíð *m* í tí fuglanavninum, sum á föroyskum eitur *skúvur* ella *skúgvur*[1], men

sum í fornmáli æt *skúfr*[2], soleiðis at hesin fuglurin nú altíð eitur *skúmur*[3] í Íslandi. Hetta skiftið (»f« verður »m«) er heldur gamalt í íslendskum, tað síggja vit av tí, at mannsnavnið *Skúfr* (óivað av fyrstu tíð sama orðið sum fuglanavnið, sí Nordisk Kultur VII, 45) verður í Flatoyarbók (o. u. 1390) skrivað við *m*-i (sí *Skúfr* og *Skúmr*[4] hjá E. H. Lind, Norsk-isländska dopnamn, 1905—1915). Hví íslendskt mál (í 14. øld og seinni) hevur *skúm(u)r*, og ikki *skúf(u)r*, er ilt at siga. Trúligt er, at lyndi til at gera varraljóð skilligari, eitt nú framman fyri hvörsfallsendingini *-s*, hevur volt broytingina. Annars eigur at verða nevnt her, at orðið *skúfur*, tá ið tað merkir »kvast, dusk« o.tíl. (Blöndal), hevur *f*, ongantíð *m*. Hava Íslendingar viljað gjört mun ímillum hetta orðið og so fuglanavnið, á sama hátt sum Föroyingar hava gjört mun ímillum orðini *ond* 'andi' (norskt *ond*, ísl. *önd*) og *ont* »villidunna« (norskt *ond*, ísl. *önd*)? Vit vita tað ikki, men úrslitið er í hvussu er tað, at forníslendskt *skúfr* eitur *skúmur*, tá ið tað er navn á fuglinum (og fyri ein part, tá ið tað er mannsnavn), men annars *skúfur*.

Vit venda okkum nú aftur at orðinum *naumur*, sum er hövuðsevni okkara.

Í bók síni »Um frumtungu Indógermana og frumheimkynni« (Rvk. 1943, bls. 79) sigur Alexander Jóhannesson, at *naumur* adj. er komið úr frumsniðinum **narwuma-* (av rótini *(s)ner-)*, og honum fylgir Halldór Halldórsson í »Stafsetningaorðabók« (Akureyri 1947), har *naumur* er sagt at vera upprunaligt **narbumaR* ella **narwumaR*). Tað er eyðsæð, hvaðan Íslendingarnir báðir hava hesa greining, teir fylgja Adolf Noreen, sum á fyrsta sinni setti fram hugsan sína í Arkiv för nordisk filologi VI (1890), bls. 305. Ritgerð Noreens eitur »Några fornnordiska judlagar« (303-339), og er fyrsti partur av henni um burturfall av *r* í sambandinum (wr og) *rw*. Fyrsta dömið, ið nevnt verður, er mannsnavnið *Þolfr* (sama navn sum fornnorrönt *Þórolfr)*, sum hann sigur koma av eldri sniði **Þórwolfr*. Síðan kemur greiningin av íslendska lýsingarorðinum *naumur* »trongur«,

ið hann heldur koma av frumnorrönum sniði **narwumaR*. Eisini í bók síni »Geschichte der Nordischen Sprachen« (sí útgávuna frá 1913, bls. 106—07) og í mállæru síni »Altisländische und Altnorwegische Grammatik« (sí útgávuna frá 1903, bls. 149), greiðir Noreen frá »ljóðlógini«, hann rakti við (»*r* hvörvur framman fyri *w*«), og í öllum frágreiðingunum er orðið *naumur* eitt hövuðsumhaldið hjá honum. Er greiðing Noreens bein, fáa vit ikki bert tað, at *naumur*, t. e. frumnorr. **narwumaR* (Gesch.: **narwumR)* fær verið skylt við fornsaksiskt *naru*, angulsaksiskt *nearu*, enskt *narrow*, men so fær lýsingarorðið *aumr* (för. *eymur*) eisini verið eitt upprunaligt **arbumR*, skylt við orðið *armr*[5] adj. (**arma-*), sum á fornum máli hevði somu merking, eins og norrönt *haust* n. (för. *heyst*) er upprunaligt **harbusta* (sbr. angulsaks. *hærfest*, týskt *herbst* o. tíl). Men viðvíkjandi »ljóðlóg« Noreens eru menn ikki á einum máli, hóast flestir halda, at upprunin at orðinum *haust* er tann, sum Noreen nevnir (ella kanska heldur **harbista*). Eg skal ikki röða langt um hetta, men víst skal verða á, at ein týdningarmikil liður í hugsanarstyrking Noreens (um forskoytið *au-)* hevur fingið deyðamein av ritgerð eftir Hjalmar Falk í »Festskrift til Finnur Jónsson« (1928, bls. 339).

Lívseigari enn annað í ritgerð Noreens hevur, sum áður er nevnt, greiningin av orðinum *naumur* verið. Men eisini her eru menn ójavnir á máli, sí t. d. av nýggjari orðabókum Holthausen: Vergleichendes und etymologisches Wörterbuch des Altwestnordischen (Göttingen 1948), har er *naumur* sett í samband við stovnin í *nauð* f. (för. *neyð*), sum longu Kluge í »Nominale Stammbildungslehre der altgermanischen Dialekte« hevði skotið upp. Sama heldur Per Persson í bókini »Studien zur Lehre von der Wurzelvariation« (Upsala 1891), og Hellquist í orðabók síni (bls. 537, 538). Hellquist sigur annars (í »Studier öfver de svenska sjönamnen«, 1903-06, bls. 449, og í orðabók síni) staðanavnið *Nömmen* (1660: stora Nöm) í Smálandi at vera komið av **nömber* adj. fornsvenskt snið av íslendska orðinum *naumur*.

Hvat siga orðabókur frá nýtslu og týdningi av lýsingarorðinum *naumur* og orðum, sum av tí eru komin? Björn Halldórsson (Lexicon islandico-danico-latinum, edit R. K. Rask, Havniæ 1814) týðir *naumur* adj. soleiðis: »periculosus v. angustus; parcus, tenax; *naumt vidkominn*, in angustiis constitutus; *hann kom sem naumast af*, ægerrime evasit.« Harumframt hevur hann av samansettum ella skyldum orðum hesi: *naumlega* adv. »vix, ægre«, *naumleiki* m. »tenacitas«, *naumingi* m. parcus«, *nauma-smídi* n. »tyrocinium«. Cleasby-Vigfússon (An Icelandic-English Dictionary, Oxford 1874) hava hesi orð: 1. *naumr* adj. »akin to *nema?* narrow, close; *í holdsins hreysi naumu* Hallgrímur Pétursson's Pasíusálmar (17. öld) 17. 10; close, scanty, *verða naumt fyrir*, to run short as to time; *hafa nauman tíma*, to have a short time; hástigið *naumast* verður nýtt sum hjáorð (adv.): »scarcely or narrowly, *eg get naumast lesið það*, I can hardly read it« 2. *naum- látr* adj. close, stingy« (Fornaldar Sögur Nordrlanda, Kaupmannahöfn 1830, 3. bind, bls. 425 t. e. 9. kapitul í Sörla Sögu Sterka[6] — handritið frá o. u. 1700). 3. *naum-liga* adv. »*scarcely*, hardly«. 4. *naumindi* n. pl. »difficulty; *með naumindum*, with difficulty«. Vit kunnu leggja aftur at, at Cleasby-Vigfússon eisini halda, at skaldaorðið *nauma* f. er skylt við orðið *naumur* adj. — Sigfús Blöndal (Islandsk-dansk Ordbog. Rvík. 1920—24), sum hevur væl av tilfari úr teimum nevndu orðabókunum, hevur her: 1. *naumur* adj. trang, snæver; ordspr. *naumt er á milli heims og helju*, der er ikke langt mellem liv og död; *í naumara lagi* = *með minna móti*, temmelig ringe; (om tiden) kort knap; *(nískur)* påholdende, karrig. — n. *naumt*. comp. *naumar*. superl. *naumast* som adv.: knapt, *vera naumt viðkominn*, være i vanskelig stilling, *verða naumt fyrir*, være lige ved at blive for sent færdig el. komme for sent; superl. *naumast* (= *varla*), næppe, med nöd og næppe; *það var naumast*, sikke noget! — 2. *naumlátur* adj. påholden, karrig. 3. *naumlega* adv. *(vrla)* næppe, knapt; *(með nísku)* sparsomt, karrigt. 4. *naumleikur*

m. knaphed, korthed, *með naumleik*, med nöd og næppe; *(sparsemi, níska)* påholdenhed, karrighed. 5. *naumgjöfull* adj., karrig, som kun giver lidt, spec. fodrer knapt. 6. *naumasmíði*, hastværksarbejde. 7. *naumindi* n. pl. vanskelighed, *með naumindum*, med nöd og næppe, *með mestu naumindum* på et hængende hår. — Fritzner (Ordbog over det gamle norske sprog, Kria 1886—96) nevnir ikki orðið *naumur* adj. ella tílíkt, men Leiv Heggstad (Gamalnorsk ordbok med nynorsk tyding, Oslo 1930) hevur orðið *naumlátr* adj. »nauv, småleg« (úr Sörla Sögu Sterka), og Jón Þorkelsson (Supplement til islandske Ordböger, 2. Saml., Rvík 1885) hevur í uppafturtöku úr bók frá 1634 hjáorðið *naumliga* (sáir þú þessu sæðinu n. niðr, þá sker þú so n. upp).

Sum vit hava sæð, er einki av dömunum her úr miðaldarhandriti[7]. Men í íslendskari skinnbók á kongliga bókasavninum í Stockholm (Pergament fol. 3), sum óprentað er, eru 4 dömi um, *navfa* (t. e. *naufa*) er nýtt á sama hátt sum nýíslendskt *naumast (og naumt)* og föroyskt *neyvan* adv. — Eisini elsta prentaða íslendska bókin, bíbliutýðingin eftir Odd Gottskálksson (prentað í Roskilde 1540) hevur orðsnið við *f* (og ikki *m*). Soleiðis stendur (1. Kor. VII, 29: »Það seige eg goder brædur / at timenn er *naufur*« (Luther: kurtz, Chr. Pedersen 1531: stacked). Á sama stað nýtir Guðbrandur Þorláksson í síni bíbliutýðing (1584) orðsniðið *naumur*. Um hetta er nóg mikið at vísa á tvey verk: Jón Helgason »Málið á Nýja Testamenti Odds Gottskálkssonar« (Kaupmannahöfn 1929, bls. 322) og Chr. Westergård-Nielsen »Låneordene i det 16. århundredes trykte islandske litteratur« (Köbenhavn 1946, bls. 234). Men eg skal leggja aftur at, at Jón Helgason hevur sagt mær, at í bendingarlag og stundum í rættskriving eru hjá Oddi orðsnið, sum kundu verið málsligir norskleikar.

Eitt er víst, at »naumr« o. til. at kalla altíð aftaná 1500 hevur »m« í íslendskum, men í norskum og föroyskum nútíðarmáli »v«, sum vit brátt fáa at síggja.

Í nýnorskum merkir *nauv* adj. (eisini: *nau* o. til.)»knap,

knibende; især om vind, som man får næsten imod sig, så at man må luve höit for at benytte den til sejlads; karrig, gnieragtig, smålig, nöjeregnende i småting« (Aasen: Norsk Ordbog, Kria 1873). Umframt hesar merkingar hevur Ross (Norsk Ordbog, Kria 1895): »knap, utilstrækkelig; forsigtig til at forsyne sig; nöjagtig, nöje tiltræffende, nöje«. Báðir Norðmenninir hava eisini samansetingar, sí bökur teirra og Torp (Nynorsk etymologisk ordbok, Kria 1919). Hvörkikyn *nauvt* verður nýtt sum hjáorð (»knapt, knibende; knap, neppe, med vanskelighed; strengt, nöjagtigt« o. tíl.), og *nauvlege* adv. er sagt at merkja »nöje, nöjagtigt, grandt«. Eisini norsk »bókmál« nýtir orðið, skrivað *nau* (sí. t. d. Norsk Riksmålsordbok) »knap; karrig« eisini um vind (*nau vind*). Orðið, sum eisini helst er til í donskum dialektum, er hildið at vera komið úr niðurtýskum (No. Riksmålsordbok).

Nú er eftir at nevna orðið í föroyskum máli. Lýsingarorðið eitur *neyvur*, og í orðabókini hjá Svabo (t. e. frá o. u. 1773 til o. u. 1810) hava vit merkingarnar: »knap, skral (om vind), obliqvus« og »karrig, præparvus«. Hesar merkingar eru til enn, soleiðis at orðið er nýtt bæði um tað, sum er í minna lagi, og um tað, at maður er natin ella pírin, og í sigling verður tað mest nýtt í samansetingini *neyvasigling*[8] (t. e. »bi-de-vind«-sigling). Hvörkikynið *neyvt* merkir »nöjagtig, nöje«, men eisini við hvört »knapt, næppe« (= *neyvan*). Vanliga hjáorðið er *neyvan* »knap, næppe, vix« (Svabo).

Tá ið vit líta at merkingunum í íslendskum *naum-*, sum í eldri íslendskum skriftum sýnist at hava havt sniðið *nauf-* og bera tær saman við merkingarnar í norskum og föroyskum, er tað meira enn trúligt, at *naumur*, *nauv* og *neyvur* eru sama orðið, og at *m* í íslendskum er komið av »f«, eins og ísl. *skúmur* er komið av *skúfr* og för. *oman* av *ofan*.

1 Enska navnið *skua* er — í 17. öld — komið úr föroyskum.

2 Í handritinum AM 748, 4to (frá o. u. 1300) er orðið skrivað *skvfr* (Edda Snorra Sturlasonar, II, Hafniæ 1852, bls. 489).

3 Björn Halldórsson sigur tó í orðabók síni (útg. 1914): »*Skúmr* m. larus fusce niger, cataractes; alias *hákallaskúmr* v. *skúfr*«.

4 Tað er sera ivasamt, um mannsnavnið *Skúmr* er til uttan sum yngri snið av mannsnavninum *Skúfr*. Tó er hjá Saxo (sí Arkiv f. nord. fil., X, 231) nevndur Norðmaður (?) *Scumbar;* hetta er hildið at vera eysturnorsk snið av mannsnavninum *Skúmr* (sí Seip í Norsk tidsskr. for sprogvidenskap III, bls. 13). Harumframt sigur Kr. Hald professari mær, at danska bygdarnavnið *Skumstrup* illa fær verið annað enn gamalt **Skúmsþorp*, so tað skuldi eisini bent á, at **Skúmr* hevur verið danskt navn við.

5 Hellquist sigur í »Svensk etymologisk ordbok« (1939), at svensk *öm*, ísl. *aumr* o. s. fr. er »en specielt nordisk bildning av ovisst ursprung«. Í sama stað sigur hann, at »den ljudlag, på vilken denna sammanställing bygges, är dock fonetisk osannolik o. stødes icke av något fullt antagligt exempel«.

6 Um Sörla Sögu Sterka sigur K. þórólfsson (Rímur fyrir 1600, Kaupmannahöfn 1934, bls. 295), at hon »er lygisaga, varla eldri enn frá 15. öld«.

7 Dömini eru öll í sövnunum hjá forníslendsku orðabókini (á universitetsbókasavninum í Keypmannahavn). Eg takki her dr Ole Widding, fyristöðumanninum, fyri beinasemi og leiðbeining á mangan hátt.

8 Hitt mótsetta eitur *rúmasigling*.

SUMMARY

In an article in *Arkiv för nordisk filologi*, 1890, vol. 6, p. 305, Adolf Noreen suggested an etymology for the Icelandic adj. *naumr*, deriving it from a postulated Proto-Norse **narwumaR* and relating it, inter alia, to English »narrow«. Some scholars (Torp, Alexander Jóhannesson etc.) accept this etymology, but others (Kluge, Persson,

Hellquist) assume that the word comes from the same root as occurs in Icel. *nauð* f. The present essay suggests that *naumr* is, in fact, identical with Norw. *nauv* and Far. *neyvur*, with change of *f* > *m*, likewise attested in Fa. *oman* »down« (Icel. *ofan*) and in Mod. Icel. *skúmur* m. »skua« from Older Icel. *skúfr*, cf. Far. *skúvur* or *skúgvur*.